Forstjórin á Formula.fo um Gigabitnetið:

# Mugu byrja skjótast gjørligt

**Ætla vit at hyggja at ætlanunum hjá Finn Helmer, sum eitt isolerað projekt í Føroyum, so er projektið sjálvandi spennandi í sjálvum sær. Men um vit síggja ætlanirnar sum eina verkætlan í Føroyum, og sum eina altjóða KT-satsing hjá føroyingum, kunnu útlitini vera ótrúliga áhugaverd. So er ikki at bíða, men vit skulu fara í gongd skjótast gjørligt**



*– Føroyar og føroyingar skulu vera við at lyfta og menna verkætlanina, og vit skulu eisini vera við, tá verkætlanin skal seljast aðrastaðni og fáa ágóðan av tí, sigur Torkil Holm Petersen*

GIGABITNET
*Orð & myndir*
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað sigur forstjórin í Formula.fo, Torkil Holm Petersen, sum er maðurin, ið fekk Finn Helmer til Føroya á vitjan, soleiðis at Finn kundi kunna føroyingar um gigabit-ætlanina.

Torkil Holm Petersen og Finn Helmer eru javngamlir báðir og kennast gjøgnum donsku fyritøkuna Medianet, sum Formula.fo samstarvar við, og har Finn Helmer er ein av høvuðseigarunum.

– Vit hava í dag eitt samstarv við Medianet, um at selja forrit í USA. Og í sambandi við, at vit frá Formula.fo vóru í Danmark hjá Medianet í arbeiðsørindum, hitti eg Finn Helmer. Vit komu í prát og hava síðani tosa nakað saman um ymisk viðurskifti. Tá ið vit, fyrr í summar, gjørdu av at bjóða Finni hendavegin, ynskti hann eisini at sleppa at kunna Føroya Tele og Landsstýrið um gigabit-ætlanir sínar, greiðir Torkil Holm Petersen frá.

Tað var eisini tað, Finn Helmer gjørdi, tá hann var her í summar, og ætlanin er, at Finn Helmer kemur aftur seinast í august ella í september.

### Tað er ikki at bíða

Formulaforstjórin ivast ikki eina løtu, tá vit spyrja hann, hvat hansara hugsanir eru um gigabit-ætlanirnar hjá Finn Helmer.

– Hugskotið er frálíkt og eg meti eisini, at tað er rætt at gera tað, sigur Torkil Holm Petersen.

Hann heldur, at av tí, at talan er um eina so umfatandi ætlan, so verður verkætlanin áhugaverd á so nógvar ymiskar hættir:

– Ætla vit at hyggja at ætlanunum hjá Finn Helmer, sum eitt isolerað projekt í Føroyum, so er projektið sjálvandi spennandi í sjálvum sær. Men um vit síggja ætlanirnar sum eina verkætlan í Føroyum, og sum eina altjóða KT-satsing hjá føroyingum, kunnu útlitini vera ótrúliga áhugaverd. So er ikki at bíða, men vit skulu fara í gongd skjótast gjørligt, heldur Torkil Holm Petersen, sum eisini hevur greiðar meiningar um, hvussu ein slík ætlan kann førast út í verki.

– Sjálvandi skal Føroya Tele vera avgerðandi partur av eini verkætlan av hesum slagnum. Eisini er neyðugt við politiskari vælvild, men so skulu Finn Helmer og ComX, saman við føroyskum fyritøkum, fáa ætlanina at rigga, sigur Torkil Holm Petersen, sum samstundis ávarar ímóti at fáa ov nógvar kokkar upp í leikin at byrja við.

Júst tað, at Føroyar og føroyskar fyritøkur skulu vera partur av verkætlanini, metir Torkil Holm Petersen vera rættiliga grundleggjandi, um ætlanin kann gerast ein succes, sæð við føroyskum eygum.

– Føroyar og føroyingar skulu vera við til at lyfta og menna verkætlanina, og vit skulu eisini vera við, tá verkætlanin skal seljast aðrastaðni og fáa ágóðan av tí, sigur Torkil Holm Petersen.

### Føroyar fáa ágóðan

Hetta ljóðar eisini sera gott, og munnu føroyingar flestir vera samdir um, at vit skulu hava bæði nyttuna og part av ágóðanum av verkætlanini. Men hvussu ímyndar Torkil Holm Petersen sær, at hetta kann gerast?

– Eg hugsi at Føroya Tele, Vinnumálaráðið og annars aðrir áhugaðir nú skulu royna at finna loysnir, sum kunnu gjøgnumføra verkætlanina. Sjálvandi havi eg onkra hugsan um, hvussu verkætlanin kann gjøgnumførast, men eg haldi ikki at tað er rætt, at eg komi við nøkrum uppskoti beint nú. Sum sagt, eiga vit heldur geva Føroya Tele og pørtunum annars møguleika at koma við loysnum, sum teir halda vera áhugaverdar og møguligar, heldur Torkil Holm Petersen.

### Mugu gagnnýta okkara støðu

Ofta verður sagt, at vit føroyingar duga ikki nóg væl at selja okkum og land okkara. Tá hevur okkara støða sum lítið land, og tað at vit liggja avbyrgd mitt í Norðuratlantshavinum, mangan verið nýtt sum ein trupulleiki og undanførsla fyri hesum.

Tað hóvar ikki Torkil Holm Petersen, sum heldur, at vit mugu brúka okkara støðu sum lítið land við stórum mobiliteti og at vit eru nýskapandi. Ikki royna at uppføra okkum, sum tey stóru londini, sum hava heilt annað grundstøði og position enn vit.

– Tað er ein natúrligur fyrimunur hjá Føroyum, at vit kunnu nýtast sum royndarland fyri konsept av ymsum slag. Okkara fysiska støða ger, at vit eisini áttu at verið áhugaverd á aðrar mátar. Til dømis sum millumstøð og til eitt nú „back-up skipanir“, greiðir Torkil Holm Petersen frá.

– Tí haldi eg, at tað er neyðugt, at vit fara at gagnnýta okkara støðu sum lítið land, og gevast við at herma eftir hinum londunum. Tað er ein sannroynd, at øll tey smáu londini, ið hava staðið seg væl, hava funnið øðrvísi loysnir enn tey stóru. Ikki minst, tá tað kemur til vinnu og vinnulóggávu, staðfestir Torkil Holm Petersen.

– Televarpið er eitt fínt dømi um eitt frálíkt føroyskt konsept, sum vónandi kann seljast í øðrum londum, heldur forstjórin í Formula. fo.

Akkurát tað, ikki altíð at herma eftir øðrum er nakað, sum Finn Helmer sjálvur var inni á, tá hann var í Føroyum. Hann segði tá, at ætla føroyingar at yvirhála, so er fortreytin hon, at vit seta ferðina upp.

– Tað júst tað sum er neyðugt. Føroyar og føroyingar eru so vanabundin, at tað er ofta trupult at seta nýhugsan í verk, sigur Torkil Holm Petersen. Skemtandi lýsir hann munin á Formula og Finn Helmer soleiðis:

– Hygg eftir okkum á Formula.fo og so Finn Helmer. Vit byrjaðu báðir hvør sína KT-fyritøku, og meðan hann seldi altjóða KT-fyritøku sína fyri knappar tíggju milliardir, so er Formula nú so spakuliga við at fáa fótin fyri seg á altjóða marknaðinum.

– Finn Helmer er langt síðani farin víðari, tí hann hugsar í 100 krónuseðlum, meðan føroyingar flestir framvegis ofta hugsa í 10 oyrum, sigur Torkil Holm Petersen at enda.

